VIÐMERKINGAR

# Havnar Arbeiðsmannafelag ber ósonn týðindir

*n s*

Fyri nú nøkrum døgum síðan bar Føroya Arbeiðarafelag (FA) umvegis fjølmiðlarnar okkum rúgvismikil tíðindi um ógvuslig tiltøk, sum fóru at verða sett í verk helt nevndin í Havnar Arbeiðsmannafelag (HA) fast um at rættast fyri arbeiðsmenn í Kollafirði (KA) var at gera limir í HA.

Leygardagin seinast var so aftur stór yvirlýsing um at formaður HA bar ósonn tíðindi í spurninginum um framtíðarstøðu limanna í KA.

Ætli mær ikki út í nakað blaðkjak, men tá tað næsta frá FA uttan iva verður eitt manifest loyvi eg mær, áðrenn tað kemur, at koma við eini viðmerking til hetta mál.

Rætt er, at á fundinum hin 27. nov. 2000 millum feløgini um støðuna aftaná samanleggingina av kommununum var av formanni HA Carl Johansen nevnt at hann dugdi illa at síggja nakað skeivt í at arbeiðsmenn í KA gjørdust limir í HA, tá kommunurnar vóru lagdar saman til Tórshavnar Kommunu og hetta hevur hann eisini boðað frá aftaná. Kanska nakað bersøgið, men tey, sum kenna formannin í HA vita at hann er vanur at kalla ein spaka fyri ein spaka og í øllum førum hevur tað hann hevur sagt so ikki verið tilætlað sum nakar meinbogi fyri arbeiðsmenn í Kollafirði.

Tað er eisini rætt, at sagt var á umrødda fundi at spurningurin um limastøðu als ikki hevði verið viðgjørdur av nevndini í KA, og tíansheldur verið til umrøðu hjá limunum.

Carl Johansen lat tá upp fyri møguleikanum at nevndin í KA spurdi limirnar um hvat teir søgdu til at gerast limir í HA. Svarið til hetta var at felagið í Tórshavn skuldi ikki leggja seg út í hvat KA og FA avgjørdi at gera.

Tó er komið fram aftaná at aðalfundur skal hava verið um málið, har avrátt skuldi vera ikki at fara uppí HA.

Kenni ikki lógarreglur Kollafjarðar Arbeiðsmannafelag og veit heldur ikki um eg havi rætt at spyrja men kundi hugsað mær at fingið svar uppá,

1) Nær var hesin aðal fundur lýstur
2) Nær var hann hildin
3) Var hetta mál á skránni
4) Hvussu nógvir limir vóru á fundi
5) Hvussu nógvir atkvøddu fyri ikki at fara uppí HA og hvussu nógvir vóru ímóti. Kanska løgfrøðingur FAs svarar mær uppá spurningarnar.

Skiftandi nevndir í Havnar Arbeiðsmannafelag, eisini við núverandi formanni á odda, hava í øðrum málum eins og í hesum verið staðiligar í síni sannføring um, at í álvara skal arbeiðast fram í móti at veita arbeiðarum batnandi kor og henda sannføring lá eisini frammaliga í huganum, tá tosað var um, at arbeiðsmenn í Kollafirði kundu gerast limir í Havnar Arbeiðsmannafelag.

Hvat framtíðin hevur at bjóða arbeiðsfólki í Kollafirði eins og aðrastaðni veit bert hin Alvaldandi, men hyggja vit aftur um bak, er neyvan neyðugt at hava meira enn fráfaringarroynd fólkaskúlans til tess at fáa eyga á, hvat núverandi formaður eins og aðrir saman við nevndini í Havnar Arbeiðsmannafelag hava staðið fyri strembanini fyri batnandi korum arbeiðaranna.

Ein av heitastu talsmonnum í síni tíð fyri at fáa bøtt um lívstrygging limanna soleiðis at hon í dag kann veita upp í kr. 200.000 í endurgjaldi við deyða og ein av ídnastu fyrisprákarum fyri at fáa sett á stovn eftirlønargrunn fyri limir felagsins var júst núverandi formaður. Hesin grunnur sá dagsins ljós 1. aug. 1983 og hóast harðar mótstøður – eisini frá onkrum fakfelag – hevur hesin grunnur frá 1. aug. 1988 fram til dagin í dag útgoldið góðar 30 milliónir krónir til teir sum hava verið limir í grunninum og, sum hava verið fylt-ir 67 ár. Farið ikki skeivur, tá eg sigi, at eisini onkur kollfirðingur tíbetur er millum teir sum fáa lut í hesum.

At eg millum annað taki hesi viðurskifti fram, kemst av at tað tykist fyri mær, sum um at Ingeborg Winther vil lata fólk halda at hon í hesum máli trínur fram sum ein onnur Jean D,arc og skal vera skjøldur arbeiðaranna í Kollafirði soleiðis at hesir ikki verða noyddir í eitt felag, sum ikki vil teimum nakað gott. Álvaratos Ingeborg Winther. Hvussu nógv hevur Føroya Arbeiðarafelag, sum er størsta arbeiðarafelag í landinum í tíni formanstíð goldið limum sínum í sama tíðarskeiði.

Rúgvusmikil tíðindi og yvirlýsingar dugna ongum arbeiðara. Men í framdum verki laðar arbeiðaraleiðari varða í søgu arbeiðaranna.

Seinast tey dansaðu rundan um Ingeborg Winther var í SVF, tá hon í 199 hevði skrivað undir sáttmála við arbeiðsgevararnar, men um tey dansa fram til jóansøkubálið fáa tey ikki viðhald frá mær í at tað skal vera ein fyrimunur fyri arbeiðaran í Kollafirði at vera limur í Føroya Arbeiðarafelag fram um Havnar Arbeiðsmannafelag – heldur tvørturímóti.

# Landsstýrið øsir danir

*un o ns n*



Týðiligari og týðiligari kemur til sjóndar, at eitt av høvuðsendamálunum hjá sitandi landsstýri, er at skapa so nógvar samanbrestir ímillum Føroyar og Danmark sum møguligt.

Danski forsætisráðharrin hevur sagt við landsstýrið, at hann ikki kann binda donsku stjórnina og danska fólkatingið í forhond til nakað, sum skal henda í framtíðini. Forsætisráðharrin metir eisini at grundlógin forðar fyri hesum.

Hjá føroyskum politikarum harafturímóti, sær út til, at hesir lættliga kunnu binda seg sjálvar, allar føroyingar og eftirkomandi løgting, nógv ára tíggir fram í tíðina.

So langt aftur sum vit minnast, hava danskir politikarar, og umboð fyri teir stóru politisku flokkarnar í Danmark sagt og endurtikið, at um føroyingar vilja hava loysing frá Danmark, so fáa teir loysing.

Frá danskari síðu verður klárt og týðiliga sagt, at tit kunnu fáa loysing, men tit mugu sjálvi gjalda. Tó vil danska stjórnin umframt binda seg til at lata landsstýrinum 4 ára kredit.

Hetta greiða tilboð stendur landsstýrinum í boði. Men nú til stykkis kemur, loypur landsstýrið frá. Landsstýrið torir ikki at biðja Føroya fólk taka støðu til ítøkiliga realpolitiska veruleikan, sum liggur á borðinum.

Týðiligari og týðiligari kemur til sjóndar, at landsstýrið hvørki veit út ella inn, og at høvuðsendamálið hjá sitandi landsstýri er at skapa so nógvar samanbrestir ímillum Føroyar og Danmark sum møguligt.

## Mátturin sveik

Veruleikin er tann, at Føroya fólk kann siga ja til loysing, við 4 ára kredit og annars gjalda tað sum tað kostar at loysa. Sjálvandi vita øll, at hetta far aðrar álvarsligar avleiðingar fyri Føroya fólk, nú rættindi og fíggjarligir fyrimunir hvørva.

Alternativið er sambandsleiðin, har sum føroyingar varðveita vælferðarsamfelagið, varðveita rættindi í ríkinum, bæði av fíggjarligum og øðrum slagi, og halda fram við menningini av føroyska samfelagnum.

# Fimmarin mikudagin 24.1.2001.

*i ib ørt u k tt, soy*

Hvørja ferð, »Fimmarin« er á skránni, og sendingin skal eitast at vara 1 tíma, so er tað bara politikarir sjálvir, sum sleppa at tosa. Lurtararnir skulu eitast at sleppa framat, men hvørja ferð tað er ein áhugaverdur lurtari, sum hevur nógv gott at frambera, verður hann næstan beinan vegin skúgvaður til viks, tí teir hava so knappa tíð, og at aðrir skulu møguliga sleppa framat eisini. Men álvaratos, hví leingja tit ikki sendingina, Fimmaran, við 1/2 til 1 tíma í staðin fyri at spæla tónleik allan dagin? Man hevur áhuga í at hoyra tað vanliga fólkið málbera seg, og ikki bara politikarar, sum einans pussa sína egnu gloriu. Fólk mugu kunna krevja eitt sindur aftur fyri rokningarnar frá Útvarpi Føroya!

Høllin á Stórheyggi 3. og 4. februar!

# Tiltøk í høllini á Stórheyggi

**TÍÐINDASKRIV**
*Jákup av Skarð*

Havnar Fimleikafelag fyllir høllina við tiltøkum: Loppumarknaði, stuðlarenning, barnabingo...

Størsta fimleikafelagið í Føroyum hevur sjálvsagt eisini tørv á inntøkum at skipa fimleikavenjingar fyri allar 1000 limirnar.
Harafturat ynskir Havnar Fimleikafelag eisini at skipa onnur tiltøk enn venjingar – tí verður fyrsta vikuskiftið í februar 2001 fylt við ymsum tiltøkum fyri allar aldursbólkar.
Vinningin av hesum tiltakið vónar felagið millum annað at nýta til amboðskeyp. Tørvur er á at tryggja fimleikarunum góðar umstøður og nógv amboð eru, ið áhugi er at keypa at stuðla undir fimleikamenningini.

Leygardagin 3. februar verður skipað fyri stuðlarenning á vøllinum á Frælsinum - við Venjingarskúlanum. Byrjað verður kl. 10. Høllin á Stórheyggi er vanliga karmur um flest alla venjing, ið Havnar Fimleikafelag skipar fyri. Men sunnudagin 4. februar verður ikki talan um fimleikavenjing, tí ta byrjar loppumarknaður kl. 14 og opið verður til kl. 19.

Afturat loppumarknaðinum verður barnabingo kl. 16 sunnudagin – eisini í høllini á Stórheyggi.
Enn er møguleiki at lata felagnum loppu-lutir. Til ber at ringja 319327 (Karina) ella at koma út á Stórheygg 30/1 kl. 19:30 ella 1/2 kl. 18.

Øll eru hjartaliga vælkomin til tiltøkini 3. og 4. februar!

Havnar Fimleikafelag



**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 2711,
**P/F Havnar Fótbóltur, 100 Tórshavn.**

**Viðtøkur broyttar:**
20.12.1999 og 10.01.2001.
**Kapitalur:** Hækking við kr. 180.000,00 til kr. 680.000,00
Inngjaldingarháttur:
Kontant kr. 180.000,00 til kurs 100. Flokkar: A. 200.000,00 og B. 480.000,00
**Nevnd:**
Farin úr nevndini: Poul Johan Sundberg Michelsen, Gundadalsvegur 19, 100 Tórshavn (formaður) og Gunnar Dávið Mohr, Blákollugøta 3, 100 Tórshavn.
Innkomin í nevndina: Kaj Leo Johannesen, Á Teigi 6, 100 Tórshavn (formaður) og John Birgir Enghamar, Granagøta 18, 100 Tórshavn.

Skráseting Føroya tann 26. januar 2001

Kristin Balle




**Ibúð søkist**

Fyri eitt av starvsfólkum okkara verður hervið søkt eftir íbúð beinanvegin.

Vinarliga setið tykkum í samband við okkum skjótast gjørligt.

**Demich**
**Tlf. 311071**

**Sethús**
**úti í Grønlandi í Havn**
**Húsini standa í Krosslíð 9**

Byggiár: 1967
Stødd: 70 m² í tveimum hæddum við innrættaðum kjallara.
Grundøki: 485 m²

til sølu um hóskandi boð fæst.

**Tlf. 312802**
eftir kl. 18



**NSÍ CUP 2001**

NSÍ bjóðar øllum dreingum og gentum at gera lið til innandurakapping í fótbólti í Ítróttarhøllini í Runavík leygardagin 03. februar og sunnudagin 4. februar 2001.

Aldursbólkarnir eru hesir:

| Nr. | Aldursbólkur | Føðiár |
|---|---|---|
| 1. | Pinkur | 1991-1992 |
| 2. | Gentur 10-12 ár | 1989-1990 |
| 3. | Smágentur 12-14 ár | 1987-1988 |
| 4. | Gentur 14-17 ár | 1984-1986 |
| 5. | Pinkulingar | 1993-1994 |
| 6. | Smápiltar | 1991-1992 |
| 7. | Piltar | 1989-1990 |
| 8. | Smádreingir | 1987-1988 |
| 9. | Dreingir | 1985-1986 |
| 10. | Unglingar | 1982-1984 |



Á hvørjum liði eru 5 leikarar á vøllinum í senn: 4 útileikarar og ein málmaður.
Loyvt er at hava ein skiftileikara.
Liðini skulu hava fótbóltsnøvn.
Luttøkugjaldið er kr. 200,- fyri hvørt liðið.
Trý tey fremstu liðini í hvørjum aldursbólki fáa heiðursmerki.

Seinasta freist at boða frá luttøku er mikudagin 31. januar 2001.

**Tilmeldingin fer fram hjá NSÍ á tlf. 44 81 00 mánakvøld til mikukvøld millum kl. 19.00 til 21.00.**

NSÍ




www.bilar.fo

**Nýggjar TANNPROTESUR**
**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**
Kliniskur tannteknikari
**BERGUR Á REYNATRØÐ**
Børkuvegur, 620 Runavík
**Tlf. 448480**
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-16

Restorffs ASSU



**Taljur**
**Stroppar**
**Trýst-slangur**
**Spuli-slangur**

**Tórshavnar Maskinhandil**
v/ Tummas Andreasen
Varðagøta 29 - 30
10 Tórshavn - Tlf. 313442

Lastbilur til sølu



**Merki: Nissan Eco-T v/krana**
**Árgangur 1997**
**Km. 70.000**
**6 tons totalvekt**
**Prísuppskot kr. 170.000,- v/MVG**

P/F Meinhardt Arge

**FARTELEFONIR**
GSM - NMT 450
Tráðleysar telefonir o. a.
Ymisk merki, so sum:
MOTOROLA
ERICSSON
NOKIA Connecting People
SIEMENS
BENEFON
SØLA & TÆNASTA
Storno Handan Á 6 - 100 Tórshavn
Tel. 314414 - Fax 318045

**Bókhald**
**Roknskapur**
**Skattur**



Tosið við okkum um hóskandi loysn til júst tygara tørv
Bókhaldsvirkið Terji T. Dalsgaard
Tlf. 361376 - fax 361309
e-mail: sand-bok@post.olivant.fo


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2331,
**Sp/f Pure Water, 700 Klaksvík.**

**Viðtøkur broyttar:**
08.12.2000
**Kapitalur:** Hækking við kr. 4.000.000,00 til kr. 4.400.000,00
Inngjaldingarháttur:
Kontant kr. 4.000.000,00 til kurs 100.

Skráseting Føroya tann 26. januar 2001

Kristin Balle